Havnar Fimleikafelag aftur í gongd

Nú summarfrítíðin hjá teim flestu er av, byrja venjingarnar í Havnar Fimleikafelagi aftur. Hendan veturin er felagið bæði á Stórheyggi og í Gundadali.

JÁKUP AV SKARÐ

Fimleikaárið 2000/2001

Tilmeldingin verður í høllini á Stórheyggi leygardagin 2. september kl. 16-18. Í sambandi við tilmeldingina verður sølubúð, har møguleiki verður at keypa vatndunkar og t-shirtir við Havnar Fimleikafelag búmerkinum á. Eisini verður møguleiki at tekna seg sum stuðul - táið ein hevur fylt út eitt skjal, verður váttað at stuðla felagnum við kr. 50,- um árið.

Havnar Fimleikafelag er mannað við nógvum fimleikarum og høllin á Stórheyggi er vorðin ov lítil at húsa øllum. Hettar hevur við sær, at venjingarnar „Kom í form I-IV" verða í hølinum í HB-húsinum í Gundadali. „Kom í form"-liðini eru ætlað vaksnu fimleikarunum, og byggja á callanetic-liðini seinasta vetur.

Upplýsandi faldari um felagið

Ársætlan er løgd við flestu tiltøkunum og longu nú fáa fimleikarar og venjarar at vita nær m.a. stórkapping, FM, venjingarlegur og framsýningar verða.

Hetta verður í faldaranum, ið fimleikarin fær, tá ið meldað verður til leygardagin. Í hesum faldara er skipanin í felagnum, ársætlanin og eisini venjingartíðirnar. Fyrstu greinina eigur formaðurin, ið býður einstaka fimleikaranum vælkomnan í felagið og ynskir øllum gott fimleikaár.

Liðini 4-5 ár

Leygardagin 2. september er tilmeldingin til ymsu liðini - hetta fer fram í høllini á Stórheyggi. Fimleikavenjingarnar byrja mánadagin 4. september eftir yvirlitinum, sett er upp - tó er undantak fyri liðini „Børn 4 ár" og „Gentur 5 ár".

Hesi lið byrja vikuna seinni, tað vil siga, at „Gentur 5 ár" eiga fyrsta fimleikatíma mánadagin 11. september og „Børn 4 ár" byrja hósdagin 14. september.

Skipanin í størsta fimleikafelagnum í Føroyum

At fleiri fimleikarar enn nakrantíð eru í Havnar Fimleikafelagi, hevur fört til umskipan í nevndar-arbeiðinum. Afturat nevndini, har Anni Kyster Durhuus er formaður, eru eisini undirdeildir, ið hava ymisk arbeiðsøki. Hettar verður grund undir tættari samstavi millum fimleikaran/foreldrini og felagið.

Havnar Fimleikafelag er mannað við hesum nevndarlimum: Anni Kyster Durhuus - formanni, Karinu Nattestad - næstformanni, Ann-Mari av Skarði - skrivara og Katrin Abrahamsen - kassameistara.

Deildirnar afturat nevndarskipanini eru: „Fíggjardeildin", „Stuðladeildin", „Fimleikadeildin", „Útbúgvingardeildin" og „Tíðindadeildin". Hesar deildir fara at gera sítt til at betri og greiðari arbeiðið er í felagnum.

Sum dømi er týdningarmikið at nevna skipanina í fimleikadeildini. Fólk er sett við málsøkjum innan fimleikapartin í felagnum: „Amboðslið", „FM-lið", „Børn til 12 ár", „Vaksin lið" og „Stórkapping". Ætlanin við hesi skipan er, at um spurningar eru um ávíst innan fimleikin, skal ein venda sær til ábyrgdaran at einstaka málsøkinum - hetta eigur eisini at verða tryggleiki hjá foreldrunum, at tey vita hvønn tey kunnu venda sær til afturat venjaranum.

Nú verður farið undir fimleikavenjingar í Havnar Fimleikafelagi og nógv tiltøk eru á skránni komandi vetur

B36 kærir dómaran

B36 hevur kært eina dómaraavgerð í dystinum millum B36 og B71. Kravt verður, at nýggjur dystur verður ásettur

JÁKUP MØRK

Einki er at taka seg aftur í, at úrslitið í heimadystinum hjá B36 móti B71 ikki var eftir vild.

Endaliga støðan gjørdist 4-2 til B71, og hóast sigurin sum so var fult uppiboriin, so ætlar B36 nú, at dysturin skal leikast av nýggjum.

Dómaramistak

Orsøkin til, at B36 hevur sent inn kæru um dystin, er ein dómaraavgerð, sum varð tikin í dystinum.

B36 metir, at talan var um eitt somikið týðandi mistak, at hetta hevði avgerandi ávirkan á dystin, og tí vilja teir hava, at FSF ógildar úrslitið av dystinum sunnudagin, og ístaðin ásetur nýggjan dyst. Í skrivinum til FSF verður greitt soleiðis frá tilburðinum:

»Í 75 minutti – støðan var tá 2-2 – varð Jón Brekku, B71, rikin av vølli fyri hevnisøku inni í B71-brotsteiginum. Bólturin var í spæli, tá tilburðurin fór fram, og dómarin, Jens Petur Brattalíð, steðgaði dystinnum, gav leikaranum reyða kortið og byrjaði dystin aftur við brotskasti uttan fyri brotsteigin. B36 hevur sjónbandsupptøku av dystinum, sum FSF kann síggja, um tað er neyðugt.«.

B36 vísir í hesum sambandi til grein 12 í fótbóltslógini, har tað er ásett, at dómarin eigur at dømna brotsspark fyri spark av, ella roynd at sparka, mótstøðumann, í brotsteiginum, meðan bólturin er í spæli. Hetta uttan mun til, hvar á vøllinum bólturin er.

Til at vísa á líknandi tilburðir nýtir B36 eina hending úr donsku superliguni, sum fór fram undanfarna kappingarár. Hetta var tá Esbjerg fekk viðhald í eini kæru, har teir kravdu at útidystur teirra móti AGF skuldi leikasta umaftur.

Ongar viðmerkingar

Tá vit í gjár settu okkum í samband við umrødda dómaran, Jens Petur Brattalíð, hevði hann als ikki fingið boð um kæruna.

Hann kundi tí sum so ikki gera nakrar konkratar viðmerkingar til málið. Hann vísti tó á, at dómarar eins og leikarar bert eru mennskjun, og tí kunnu tey sjálvsagt eisini gera mistøk.

Um sjálva hendingina við útvísingini segði hann, at hann hevði sent frágreiðing til FSF hesum viðvíkjandi, soleiðis sum fyriskrivað í kappingarreglunum, og at hann ikki hevði frætt meira um hetta.

Børge B. Hansen, formaður í kappingarnevndini hjá FSF, vildi heldur ikki gera beinleiðis viðmerkingar til málið:

- Eg havi biðið umsiting okkara um at senda avrit av kæruni og frágreiðing dómarans um útvísingina til limirnar í kappingarnevndini, so hesir kunnu verða kunnaðir. Væbntandi verður fundur um málið leygardagin, og verður tá avgjørt, um nakað skal henda víðari í hesum máli.

Formaðurin í kappingarnevndini, Børge B. Hansen, hevur ongar beinleiðis viðmerkingar til málið, men sigur, at kappingarnevndin væntandi fer at viðgera hetta á fundi hósdagin

Helst 2 vikur

Mannagongdin í slíkum førum er annars tann, at um kappingarnevndin metir, at nakað meira skal henda í málinum, skulu allir innblandaðir partar geva frágreiðing um málið.

Hetta merkir, at um kappingarnevndin á fundi leygardagin kemur til tað niðurstøðu, at málið skal kannast gjøllari, skulu bæði dómari og B71 geva frágreiðing í málinum.

Kemur kappingarnevndin hinvegin til ta niðurstøðu, at kæran skal avvísast, er málið sum so avgreitt frá teirra síðu. B36 hevur tá møguleikan at kæra avgerðina hjá kappingarnevndini til dómsnevndina.

Gevur kappingarnevndin hinvegin B36 viðhald í kæruni, hava sandoyingar sjálvandi møguleika at kæra dómin, so lítkt er til, at tað í øllum førum ganga einar tvær vikur, áðrenn endalig avgerð er tikin í málinum.

Kappsiglingarnar í ár eru at enda komnar.

Kollfarðabáturin, Leivur, gjørdist føroyamestari í kappsigling

Spenningur var sera stórur, áðrenn seinastu kappsigling, sum var nú sunnudagin 27. august hjá Lions Club Eysturoy, tí tað var tætt millum teir fremstu bátarnar.

Føroyameistari gjørdist **"Leivur"** í Kollafirði við 99 stigum,
nr. 2 gjørdist **"Hoyvíksbáturin"** úr Hoyvík við 97 stigum, meðan **"Gjáarbáturin"** úr Kollafirði gjørdist nr.. 3 við við 89 stigum.

Tilsamans 42 bátar hava tikið lut í kappsiglingunum í ár.

Áhugafelagið "Seglið" takkar øllum fyri luttøkuna og fyri hjálpina.

Havnar Fimleikafelag

á Stórheyggi • Postboks 3145 • Tel. 314851 • Korttelefon: 320739

VENJINGARTÍÐIR 2000/2001

Barnalið Framsýning	*Venjingartíðir*		*Høll*	*Venjari*
Børn og foreldur	Mik.	17.00-18.00	I+II	Elsa
Børn 4 ár (byrja 11/9)	Hós.	16.30-17.30	I	Ann-Mari og Jákup
Gentur 5 ár (byrja 11/9)	Mán.	16.30-17.30	I	Ann-Mari
Gentur 6 ár	Týs.	17.00-18.00	I	Katrin H.
Gentur 1. fl.	Mik.	16.00-17.00	I	Elsa, Gyðja og Ásla
Gentur 2. fl.	Hós.	17.00-18.15	II	Anja og Ása
Gentur 3. fl.	Mán.	15.30-16.45	II	Gunn og Jóna
Gentur 4. fl.	Týs.	15.45-17.00	II	Hildigunn og Rannvá
Gentur 5. fl.	Mán.	16.45-18.00	II	Bára
Gentur 6. fl.	Mik.	19.15-20.45	I	Eilen og Birita
Gentur 7. fl.	Mán.	19.00-20.30	I	Joan
Gentur 1. fl. amboð	Mán.	15.30-16.30	I	Sólrun og Marjun Per.
Gentur 2. og 3. fl. amboð	Hós.	18.15-19.30	II	Sigga og Marjun Pet.
Gentur 4. og 5. fl. amboð	Mán.	17.45-19.00	I	Frida
Gentur 6. og 7. fl. amboð	Hós.	19.00-20.30	I	Elin og Svanna
Dreingir 5 ár	Hós.	17.45-18.45	I	
Dreingir 6 ár	Týs.	17.00-18.00	II	Jákup J. og Heini H.
Dreingir 1 fl.	Mik.	16.00-17.00	II	Tórarinn og Heini H.
Dreingir 2. og 3 fl.	Mán.	18.00-19.15	II	Andrias
Dreingir 4. og 5 fl.	Mán.	19.15-20.30	II	Heini í D.
Dreingir 6. og 7 fl.	Mik.	19.15-20.45	II	Høgni A. og Marina
Unglingar og vaksnamannalið Framsýning				
Gentur 8. fl.	Hós.	19.30-21.00	II	Kára og Katrin K.
Unglingar 8. fl. og eldri amboð	Frí.	17.00-18.30	I+II	Heini og Svanna
Gentur 9. fl. til 19 ár	Hós.	20.30-22.00	I	Sisse
Kvinnur frá 20 ár	Týs.	19.30-21.00	I	Karina
Kvinnur	Týs.	19.30-21.00	II	Anni
Menn	Týs.	21.00-22.00	II	Torkil
	Hós.	21.00-22.00	II	
Motiónslið Ikki framsýning — Callanetic, styrki og konditión				
Kom í form I, vand	Mán.	18.00-19.15	HB- húsið	Jeanette
Kom í form II, byrjarar	mán.	19.15-20.30	HB- húsið	Jeanette
Kom í form III	Hós.	18.00-19.15	HB- húsið	Valborg
Kom í form IV, tilkomin	Mik.	19.15-20.30	HB- húsið	Helena
Úttøkulið Kappingar og framsýning				
Pinkur (7-9 ár.)	Mik.	18.00-19.15	I	June-Eyð
	Frí.	15.30-17.00	I+II	
Smágentur (9-12 ár.) *	Mik.	17.00-19.15	II	Joan og Katrin J.
	Ley.	14.30-16.00	I+II	
Gentur (13-16 ár.) *	Mik.	20.45-22.15	I	Salua
	Ley.	11.30-13.00	I+II	
Kvinnur *	Mik.	20.45-22.15	II	
	Sun.	14.30-16.00	I+II	
FM 9-13 ár	Týs.	18.00-19.30	I+II	Sjúrður og Heidi
	Ley.	10.00-11.30	I+II	
FM 14 ár og eldri	Mán.	20.30-22.00	I+II	Eyvind
	Ley.	13.00-14.30	I+II	

* Tilmelding: Úttøka eftir tveimum vikum.

Fimleikurin byrjar:
Mánadagin 6. september 2000.

Tilmelding:
leygardagin 2. september 2000 kl. 16.00-18.00 í høllini á Stórheyggi.

Limagjald:
Verður goldið við tilmelding ella eftir 1. venjingartíma.

Kostnaður:
Fyri allan veturin

Børn
4 ár - 1. flokk
200,- kr.

2. flokkur - 5. flokk
225,- kr.

6. flokkur - 8. flokk
250,- kr.

9. flokkur - 19 ár.
350,- kr.

Børn og foreldur
350,- kr.

Frá 20 ár
450 kr.

Menn
500,- kr.

Fyri hvart eykalið
100,- kr.

Kom í form:

1. ferð um vikuna
400,- kr.

2. ferð um vikuna
500,- kr.

Íðka fimleik hjá Havnar Fimleikafelag

Vit hava fimleik fyri øll

Sosialurin - 311820

2. uppstillingarfundur til býráðsvalið

2. uppstillingarfundur til býráðsvalið til Tórshavnar býráð verður á Hotel Hafnia mánakvøldið 4.9.2000 kl. 19.30

kall • 31 65 11

SUÐURSTREYMOYAR TJÓÐVELDISFELAG

Vaitant

Galvaniseraðir viðfestisvognar

Eykalutir, útgerð, søla og service. Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki!

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

ÚTSØLAN heldur fram

M.a.
Nakrir brúðarkjólar fyri kl. 1.200,-
Konfirmatiónskjólar úr feston toy (egna seg at seyma burturúr) fyri kr. 50,-
Frakkar • Jakkar
Niðurdeilar NÓGV
NIÐURSETT!

Vælkomin inn á gólvið

Skálabúðin
Dr. Jakobsensgøta 21 - Tel 315315

Postordrar verða avgreiddir

Sosialurin - 311820

Venjingartíðir hjá Havnar Fimleikafelag í høllini á Stórheyggi

Kl.	Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hósdag	Fríggjadag	Leygardag	Sunnudag
15.30							
15.45	1. fl. gentur amboð						
16.00		Gentur 3.fl.			Pinkur	FM 9-13 ár 10.00-11.30	
16.30			Gentur 4.fl.	1 fl. gentur / 1 fl. dreingir			
17.00	Gentur 5 ár				Børn 4 ár		
17.30		Gentur 5.fl.	Gentur 6 ár / Dreingir 6 ár	Børn og foreldur			
17.45					2. fl. gentur	Unglingar 8. fl og eldri amboð	SK gentur 11.30-13.00
18.00	4. og 5.fl. gentur amboð				Dreingir 5 ár		
19.00		2. og 3. fl. dreingir	FM 9-13 ár	SK pinkur / SK smá-gentur			
19.15					2. og 3 fl. gentur		
19.30	7. fl. gentur	4. og 5. fl. dreingir					FM 14 ár og eldri 13.00-14.30
20.00			Kvinnur frá 20 ár	6. fl. gentur / 6. og 7. fl. dreingir	6. og 7. fl. gentur amboð		
20.30					8. fl. gentur		
20.45							
21.00	FM 14 ár og eldri		Kvinnur				SK smágentur 14.30-16.00 / SK kvinnur 14.30-16.00
			Menn	SK gentur / SK kvinnur	9. fl - 19 ár gentur	Menn	
22.00							
22.15							

Íðka fimleik hjá Havnar Fimleikafelag
Vit hava fimleik fyri øll

Nýggjar TANNPROTESUR

Broytingar og umvælingar av gomlum protesum

Kliniskur tannteknikari
BERGUR Á REYNATRØÐ
Børkuvegur, 620 Runavík
Tlf. 448480
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

Venjingartíðir í HB-húsinum

Callanetics, styrki og konditión

Kl.	Mánadag	Mikudag	Hósdag
18.00	Kom í form I vand		Kom í form III vand
19.15	Kom í form II byrjarar	Kom í form IV tilkomin	
20.30			